LØGTINGIÐ

**Løgtingsformaðurin**

14. apríl 2026

**Býti av løgtingsmálum í mun til løgtingsnevndirnar**

Løgtingsformaðurin hevur tikið avgerð um, at løgtingsmálini yvirskipað verða býtt soleiðis í nevnd:

- Løgtingsmál frá løgmanni verða beind í Rættarnevndina, tó verða yvirtøkumál beind í Uttanlandsnevndina.
- Løgtingsmál frá landsstýrismanninum í uttanríkis- og fiskivinnumálum verða beind í ávikavist Uttanlandsnevndina og Vinnunevndina.
- Løgtingsmál frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum verða beind í Fíggjarnevndina. Somuleiðis verða uppskot til verklagslógir beind í Fíggjarnevndina.
- Løgtingsmál frá landsstýrismanninum í vinnumálum verða beind í Vinnunevndina, tó verða útlendinga-, integratións- og kommunumál beind í Rættarnevndina.
- Løgtingsmál frá landsstýriskvinnuni í almanna- og bústaðarmálum verða beind í Trivnaðarnevndina, tó verða arbeiðsmarknaðar-, arbeiðsumhvørvis- og vanlukkutryggingarmál beind í Rættarnevndina.
- Løgtingsmál frá landsstýriskvinnuni í heilsu- og orkumálum verða beind í Trivnaðarnevndina, tó verða orku- og umhvørvismál og byggimál beind í Vinnunevndina, meðan navnamál verða beind í Mentanarnevndina.
- Løgtingsmál frá landsstýrismanninum í mentamálum verða beind í Mentanarnevndina, tó verða serforsorgarmál viðvíkjandi børnum og ungum beind í Trivnaðarnevndina.

Johan Dahl
løgtingsformaður